# Bíligari el-vørur og dýrari góðgæti

**Løgtingið samtykti mikudagin, at avgjøldini á fleiri el-vørum skal takast av, og eisini varð samtykt, at avgjald skal leggjast á ávísar bólkar av ósunnum vørum**

LÓGARBROYTINGAR

*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Á løgtingsfundi mikudagin var 3. viðgerð av uppskotinum um at strika avgjøld á el-vørur so sum sjónvørp, DVD-spælarar, rakimaskinur og annað á skránni.

**Vænta tað sama í landskassan**

Tær flestu vørunum hava havt eitt innflutningsavgjald upp á 30 prosent, og tí merkir hetta, at inntøkurnar hjá landskassanum fara at minka. Men landsstýrið væntar, at strikaðu avgjøldini fara at hava við sær, at sølan av hesum vørum fer økjast munandi, soleiðis at tá ið alt kemur til alt ikki fer at síggjast aftur á landskassainntøkunum, bleiv sagt í viðmerkingunum til uppskotið.

Lógaruppskotið um avgjøld á ymiskar ósunnar vørur bleiv eisini samtykt á fundinum mikudagin. Hetta lóguppskot hevur við sær, at eitt ávíst gjald verður lagt á hvørt kilo av innfluttu vøruni, og harafturat skal gjaldast ein prosent partur av fakturaupphæddini í avgjaldi.

Upprunaliga uppskotið var, at gjaldast skuldi 12 krónur í avgjaldi fyri hvørt kilo av innfluttari vøru, og harafturat skuldi gjaldast 30 prosent av fakturaprísinum. Nakrir tinglimir komu tó við einum broytingaruppskoti, so at tað einans skal gjaldast 10 prosent av fakturaprísinum, og hetta varð samtykt.

Sagt verður, at við at broytingaruppskotið forðar fyri, at munurin millum tær dýraru og bíligari vørurnar verður ovurhonds stórur.

Lógin um avgjøldini á ósunnu vørurnar fer at hava við sær eina meirinntøku til landskassan upp á umleið 18 milliónir, sigur landsstýrið í viðmerkingum sínum til uppskotið.

Báðar tær nýggju lógirnar koma í gildi sunnudagin 1. mai.

Poli Persson, Radiohandilin

# – Vit vænta økta sølu



**Í Radiohandilinum í miðbýnum í Havn fegnast eigaran um broytingarnar í avgjaldslógini, og hann ivast ikki í, at sølan fer at vaksa av tí sama**

AVGJALDSLÓG

*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Poli Persson, eigari av Radiohandilinum, sigur, at sølan hevur verið rættuliga deyð, síðani landsstýrið í fjør summar alment var frammi við ætlanini um at taka av avgjøld á eitt nú sjónvørp.

**Stórur eftirspurningur**

Sølan vaks tó eitt sindur aftur nakað fyri jól í fjør, tá ið landsstýrið hevði hug til at trekkja í land aftur, greiðir Poli Persson frá.

- Men tá ið teir um hálvan februar enn einaferð meldaðu út, at nú fór tað at verða, so steðgaði sølan upp aftur. Síðani tá hava vit eisini sjálvir heitt á fólk, sum hava havt ætlanir um at keypa eitt nú sjónvarp, um at bíða, tí broytingarnar í avgjaldslógini fóru at hava við sær, at tey fóru at spara fitt av peningi, sigur Poli Persson.

Stjórin í Radiohand-ilinum sigur, at hesar seinastu vikurnar hevur eftirspurningurin verið sera stórur, og hann ivast ikki í, at tað fer at síggjast aftur í søluni, at avgjaldið verður nú verður strikað.

- Tað er eingin sum helst ivi um, at sølan hjá okkum fer at økjast, tí prísfallið verður so mikið markant. Hetta stig, sum landsstýrið hevur tikið, er ógvuliga gott fyri okkum, og vit eru sera væl nøgdir, hóast tað hevur tikið sína tíð, sigur Poli Persson.

Spurdur hvussu stórar prísbroytingarnar fara at verða, sigur Poli Persson, at tær verða stórar.

- Um vit til dømis taka eitt sjónvarp, sum undan broytingunum kostaði 10.000 krónur, so fer tað nú at kosta í mesta lagi 7.500 krónur, so tað er eitt prísfall, ið merkist, sigur Poli Persson.

# Úr Vágsbotni til Brasil

**Tey skulu spæla í Miðlahúsinum í Vágsbotni sunnudagin, men tey eru ávegis til Brasil við sínum tónleikakynstrum**

TÓNLEIKALÍV

*Hans Kárason Mikkelsen*
*hans@sosialurin.fo*





*Undir leiðslu av Karen Sturlaugsson spælir Skansa Big-Band saman við einum íslendskum big-band á ferðini í Íslandi. Skansa Big-Band skal spæla í Miðlahúsinum sunnudagin, og tey vera eisini við mentanarnáttina 3. juni í Grasagarði*

Talan er um big-band hjá Musikkskúlanum í Havn. Skansa Big-Band er mannað við evnaríkum tónleikarum úr tíggju árum upp í 15 ára aldur. Katrin Jørgensen er ein av lærarunum á Musikkskúlanum, sum hevur verið knýtt at Skansa Big-Band, ið júst er komið aftur av konsertferð í Íslandi.

*- Vit fingu sera góða móttøku allastaðni í Íslandi. Børnini vóru sera fitt og nem. "Most well behaved students," søgdu tey haryviri. Alt gekk sum fótur í hosu, sigur Katrin Jørgensen*

- Vit byrjaðu big-bandið fyri børn fyri tveimum árum síðani, og vit hildu tað vera spennandi at stevna ímóti at koma á ferð uttanlands. Vit søktu so um stuðul, og fingu játtaðan stuðul og fóru tískil til Íslands. Eg kann nevna, at lærararnir Atli Petersen, Eirikur Skála og eg sjálv hava øll tikið okkara tónleikaútbúgving í Íslandi. So tað var upplagt at fara til Íslands, tí vit kenna fólk í musikkumhvørvinum í Íslandi, sigur Katrin Jørgensen, musikkskúlalærari.

- Tað var eitt stórt upplivilsi fyri børnini at fara til Íslands. Vit eru øll sera fegin um túrin. Vit høvdu fleiri konsertir í Íslandi, til dømis í Keflavík. Vit spældu saman við øðrum big-bands í Íslandi, og har fingu føroysku børnini øgiliga inspiratión. Tey hava stóra tradition fyri big-band í Keflavík, og tey hava eitt ótrúliga gott orkestur haryviri. So børnini hjá okkum vóru heilt uppi at koyra, tá tey komu heim, tí tey hildu tað var so gott, sigur Katrin Jørgensen.

**Til Brasil**

Nú er so ætlanin at fara til Brasil við big-band-tónleikinum. Skansa Big-Band roynir at savna inn pening til næstu ferðina, og tað er við hesum fyri eyga, at Skansa Big-Band spælir í Miðlahúsinum í Vágsbotni sunnudagin.

- Um onkur hevur eitt tiltak, so vilja vit fegin bjóða okkum fram við løttum og góðum tónleiki. Sunnudagin 1. mai aftaná hátíðarhaldið á Vaglinum í Havn fer Skansa Big-Band at spæla í Miðlahúsinum í Vágsbotni. Hetta verður umleið klokkan 14:30, sigur Katrin Jørgensen, musikkskúlalærari.

Tvey nýggja føroysk stykki verða at hoyra í Vágsbotni sunnudagin. Atli Petersen hevur komponerað "Sólarklárt," sum er eitt rokkut stykkið. Og navnframi føroyski komponisturin Erikovj Skalavovskij hevur sett saman "Swingovski."

Katrin Jørgensen sigur, at Skansa Big-Band takkar fyri stuðulin, sum tey hava fingið kring landið frá fyritøkum og grunnum.